

*Nú er sjálvsavgerðarrættur okkara fráboðaður í ST og tí er hann omanfyri heimstýrislóg og grundlóg og allar aðrar lógir, sigur løgmaður*

# Ein løgin støða at koma í

**Eg hevði ikki væntað, at tey, sum leika mest í, eru júst tey, sum átti at havt hetta sum eitt heilagt mál, sigur løgmaður**

SJÁLVSAVGERÐAR-RÆTTUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er ein øgiliga løgin støða at koma í.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er ógvuliga bilsin av móttøkuni, sum fráboðan hansara í nýggjársrøðuni fekk, tá ið hann fortaldi tey tíðindi, at danska stjórnin hevur fráboðað St uttanríkispolitisku heimildarlógirnar.

– Hetta er eitt stórt frambrot fyri okkum, tí nú er tað staðfest í sjálvum ST, at sjálvsavgerðarrætturin liggur hjá føroyingum og ongum øðrum.

Men sum kjakið seinastu dagarnar hevur víst, er alt annað enn semja um tað, ikki minst hevur tjóðveldisflokkurin funnist harðliga at og hevur kallað hetta eitt tað størsta afturstigið fyri føroysku tjóðina.

– Fyri tjóðveldisfólk átti sjálvsavgerðarrætturin at verið eitt heilagt mál og tað kemur púra óvart á meg, at júst tað júst skulu vera tey, sum eru ringast at sannføra og sum duga ringast at síggja, tað frambrot, sum hetta er, sigur løgmaður.

– Eg kann ikki koma til aðra niðurstøðu, enn, at ilt eyga kann onki gott sjá.

Tað er eitt veldugt framstig fyri sjálvstýrisrørsluní í Føroyum, at vit nú hava fingið staðfest okkara sjálvsavgerðarrætt og at hesin sjálvsavgerðarrættur er fráboðaður ST.

### Omanfyri allar aðrar lógir

Løgmaður minnir á, at í síni tíð samráddust tjóðveldisflokkurin við donsku stjórnina, men tær samráðingarnar strandaðu nettupp uppá spurningin um sjálvsavgerðarrættin.

Tað var tann 26. oktober í 2000, at danir noktaðu at viðurkenna føroyska sjálvsavgerðarrættin og tí slitnaðu samráðingarnar.

– Nú megnaði hendan samgongan fyrst at danska forsætisráðharran at staðfesta sjálvsavgerðarrættin í eini felagsn yvirlýsing.

– Tá frøddust Høgni Hoydal, men so broytti hann støðu og kom til ta úrslit, at hetta var týdningarleyst so leingi tað ikki varð fráboðað ST.

Jóannes Eidesgaard vísir, at nú er tað so fráboðað ST, men nú er tað heldur ikki gott, tú nú verður ivi sáddur um, hvat sjálvsavgerðarættur er.

Hann vísir á, at sjálvsavgerðarrættur er greitt defineraður. Tað er rætturin hjá føroyingum at avgera okkara egnu framtíð og tann rætturin er nú staðfestur í ST og kemur sostatt undir ST sáttmalan. Sostatt er hann eisini omanfyri bæði heimastýrislóg, grundlóg, uttanríkispolitiska heimildarlóg og allar aðrar lógir.

– Varð hon avmarkað, hví skuldi hon so fráboðast ST? spyr løgmaður.

Løgmaður sigur, at tað tíð er torført hjá honum at skilja, at tjóðveldisfólk ikki vilja fegnast um hetta, men gera alt, tey kunnu, at tileinkisgera fráboðanina til ST.

– At vit í løtuni hava ríkisfelagsskap og heimstýrislóg, er ein veruleiki, sum vit mugu góðtaka, men nú kunnu føroysingar sjálvir avgerða, nør og hvussu hendan støðan skal broytast.

# Betri vegir gjøgnum bygdina



*Vegakervið í Vestmanna verður bøtt munandi í hesum árinum*

**Vestmanna:** Arbeiðið við at betra um vegirnar í bygdini fer somuleiðis at halda fram í hesum árinum.

Í fjør varð farið undir onkra bráðfangis ábøtur á Niðara Vegi, og í ár er so ætlanin at halda fram. Í hesum arbeiðinum verður vegurin eisini nútímansgjørdur.

Kommunan ætlar somuleiðis at ein partur av Fjalsvegi skal gerast í ár. Hetta verður gjørt fyri at fólk kunnu fara undur at byggja á teimum uttastu grundøkjunum.

Sum skilst, so er ætlanin eisini at gera ábøtur á aðrar vegir í kommununi í ár.

Hinvegin so er ætlanin, at størsti parturin av Niðara Vegi verður gjørdur í hesi setuni hjá bygdaráðnum.

**sb.**

# Hjún sleppa á skeið

**Hjúnalega:** Seinasta vikuskiftið í hesum mánaðinum verður skipað fyri serstakari hjúnabandslegu á Hotel Vágum.

Undirvísari verður norðmaðurin Eivind Frøen, sum er væl kendur av nógvum føroyingum sum ein maður við nógvum royndum, bæði sum talari á møtum, undirvísari og sum samtalupartnari hjá hjúnum.

Henda legan er fyri hjún í øllum aldrum - tað vil so aftur siga, at bæði n‡gift og diamantbrúðarpør eru vælkomin á leguna.

– Hetta er eitt givið høvi í hesi stressaðu tíð at steðga á og hava tíð til hjúnarfelagan, sigur Jóni Johannesen í Havn, sum saman við konuni, Miu skipar fyri hesi leguni.

**sb.**

# Gøtunøvn til allar bygdir

**Sørvágur:** Eins og í so nógvum øðrum bygdum so arbeiðir okkara vestasta kommuna eisini við at skipa økini við gøtunøvnum og numrum.

Teir eru komnir nakað áleiðis við hesum arbeiðinum: Í Sørvági er hetta um at verða liðugt, og húsanummur eru komin á øll hús og allar bygningar í bygdini.

– Í Bø eru uppskot til nøvn á vegum og gøtum klárt, og er ætlanin at fáa hesi góðkend hjá myndugleikunum, uppl‡sir borgarstjórin, Jákup Suni Lauritsen.

Hinvegin so fer tekniska nevndin hjá kommununi at skipa soleiðis fyri, at vegir og gøtur í Gásadali og í Mykinesi somuleiðis fara at fáa nøvn.

**sb.**



*Sørvágur hevur longu fingið gøtunøvn og nummur, og nú stendur Bøur (myndin) fyri tørni*